# Helst ov seint at fara undir nakað nýtt

**- Nú líður so væl, til vit aftur fara at taka laks, og tí er ivasamt, um tað loysir seg at fara undir nakra aðra framleiðslu á virkinum nú, sigur Heri Hjelm**

ALIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Einki framleiðsluvirksemi hevur verið á Suðurlaks í Vági og Roykivirkinum í Porkeri síðan einaferð seint í ár 2002. Orsøkin til, at steðgur kom í, var, at Heri Hjelm misti ein stóran part av laksinum, tá ið aliringar slitu í illveðri og fórust í brimi. Eingin fiskur var at taka, tá ið leið út á árið og tey, sum starvaðust í framleiðsluni, vórðu uppsøgd.

Heri umhugsaði ymiskar møguleikar, eitt nú at keypa laks aðrastaðni til virkingar, og somuleiðis var uppá tal at arbeiða feskan fisk undan Føroyum, meðan bíðað varð eftir, at laksurin, sum gongur í ringunum, gjørdist tøkuførur.

Føroya Fiskavirking, sum eigur virkið, ið Heri leigar í Vági, hevur ikki viljað, at Suðurlaks fór at arbeiða fisk undan Føroyum.



*Maskinmenninir eru til arbeiðis á virkinum, Suðurlaks í Vági, og alingin gongur sína gongd. - Í juni/ juli hava vit aftur tøkuføran fisk, og tá vænta vit at kunna taka eini 50-60 tons um dagin, sigur Heri Hjelm.*

## 50-60 tons

Suðurlaks er eitt stórt og dýrt virkið, sum er ógvuliga væl útgjørt við maskinum til meirvirking av alifiski.

Nú nógv hevur verið frammi um norska felagið, Pan-Fish, sum Heri samstarvar við, hava søgur gingið um, at støðan hjá norska felagnum kundi fara at ganga útyvir virksemið í Vági.

Men Heri sigur, at alt gongur sína gongd.

- Vit hava einki framleiðsluvirksemi havt á virkjunum seinastu mánaðirnar, men gongst sum ætlað, fara vit at taka fisk aftur úr ringunum um mánaðarskiftið, juni/ juli.

Hann sigur, at vøksturin hevur verið góður í vetur, og væntar, at eini 50-60 tons kunnu takast um dagin, tá ið gongd kemur á aftur.

## Ov seint

Spurdur, um ætlaninar nú eru sleptar at arbeiða keyptan fisk í Vági, sigur Heri:

- Nú er so nógv útliðið, og nú líður so væl, til fiskurin hjá okkum aftur er tøkuførur, at ivasamt er, hvat loysir seg.

Hann sigur, at maskinmenninir hava alla tíðina verið til arbeiðis á Suðurlaks, og virkið er klárt at taka ímóti alifiski.

- Men skuldu vit arbeitt annan fisk, hevði verið neyðugt við nøkrum broytingum, sum ikki eru gjørdar, sigur Heri Hjelm.

Nú steðgur hevur verið í framleiðsluni í Vági og í Porkeri, hevur alingin gingið sína vanligu gongd, bæði smoltalingin og alingin úti á.

## Í Noregi

Dóttir Hera, Rúna Hjelm, sum er stjóri í fyritøkuni, er í Noregi í løtuni. Sum skilst, er ætlaninin hjá henni at fáast við krækilingaaling í Trønderlag einar 2-3 mánaðir, nú steðgur er í framleiðsluvirkseminum í Vági og Porkeri.

# Grækarismessuhald á torginum í Saltangará

GRÆKARISMESSA
*Vilmund Jacobsen*

**Saltangará:** Mikudagin, 12. mars, skipar Runavíkar býráð fyri grækarismessuhaldi á torginum við býráðshúsini í Saltangará.

Røðari hendan dagin verður Harry Hansen, skúlatænari, á Toftum.

Skótarnir fara at seta sín dám á dagin við skrúgongu, og Nes sóknar Musikfelag fer at undirhalda við hornatónleiki.

Grækarismessuhaldið byrjar kl. 17.30.

Harry Hansen er ikki ókendur um hesar leiðir. Umframt at hava verið skúlatænari í mong ár, sæst hann javnan renna eftir vegunum, hóast hann ikki er nakar ársungi longur.

Harry er pápi Absalon Hansen, sum vann marathon-renningina á Oyggjaleikunum í Føroyum í 1989.

Sjálvur hevur Harry verið við í nógvum rennikappingum, og hóast árini, er hann lættari og orkar betri enn mangur ein unglingur.




*Harry Hansen fer at halda grækarismessurøðuna á torginum í Saltangará*

# Western Endeavour aftur á Fuglafirði



*Írski báturin, Western Endeavour, hevur í seinastuni lagt tríggjar lastir upp til Havsbrún í Fuglafirði. Teir hava havt umleið 2300 tons av svartkjafti hvørja ferð.*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

ÍDNAÐARLANDINGAR
*Vilmund Jacobsen*

Fuglafjørður: Írski báturin, Western Endeavour, hevur seinastu tíðina lagt tríggjar svartkjaftalastir upp til Havsbrún í Fuglafirði.

Sunnumorgunin kl. 9 vóru teir á Fuglafirði av triðja túrinum á hesum sinni. Landingin byrjaði kl. 13 sunnudagin, og mánamorgunin kl. 06 vóru seinastu fiskarnir komnir upp úr lastini.

Western Endeavour hevur havt umleið 2300 tons av svartkjafti hvønn túrin. Teir royna vestanfyri Írland, og tað tekur teimum tvey samdøgur at sigla heim til Føroya við lastini.

## Hini skipini

Á Havsbrún veit Jákup Oluf Joensen at siga, at Krúnborg og Chr. í Grótinum royna eftir lodnu í Faksabuktini, vestanfyri Reykjanes. Teinurin úr Reykjanesi og higar til lands er stívliga 450 fjórðingar.

Jákup Oluf heldur, at Saksaberg eisini er á lodnuveiði í Íslandi, men skipið lastar bert 800 tons, og tí leggja teir helst veiðina upp har yviri.

Tróndur í Gøtu fór ætlandi á svartkjaftaveiði vestanfyri Írland; teir byrjaðu hendan túrin í seinnu helvt av síðstu viku.

Høgaberg, fyrrverandi Gullfinnur, sum herfyri kom í flotan fyri Jón Sigurðsson og Norðborg, eru í Barentshavinum.



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## PE 20 ár

Mánadagin 10. mars vóru liðin 20 ár síðan matvøruhandilin í Stoffalág, sum í dag eitur Sp/f PE, bleiv stovnaður. Tað var Petur Eirik Djurhuus úr Søldarfirði, sum stovnaði handilin sum P.W. Kolonial 10. mars 1983. Seinni skifti handilin navn til P.E. Kolonial. Í dag er navnið bert Sp/f PE Petur Eirik sigldi eina tíð, áðrenn hann fór í læru sum krambúðarkallur í rør og sanitet handlinum hjá Hans M. Reinert við Hoyvíksvegin í Havn frá 1976-79. Síðan sigldi hann eina tíð og arbeiddi hjá famljufyritøkuni P.W. Kolonial í Søldarfirði, til hann stovnaði sín egna handil. Hann er uppvaksin við handli í familjuni, og er hann ein av eftirkomarunum hjá Hans Petur Weihe, sum byrjaði at handla í Søldarfirði fyri meria enn 100 árum síðan. Handilin í Søldarfirði er nú afturlatin.



*Petur Eirik Djurhuus í PE-handlinum á Argjum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Umframt handilin í Stoffalág, har sjey fólk arbeiða, er eisini ein PE handil á Argjum við tveimum starvsfólkum. Skúlanæmingar arbeiða eisini í handlunum eftir skúlatíð. Síðan 1990 hevur handilin verið limur í handlisketuni Samkeyp, sum í dag telur 23 handlar kring landið. Í sambandi við føðingardagin hava PE-handlarnir fleiri góð tilboð hesa vikuna.

**mg**

## Svenning Reinert 40 ára starvsdag



Í dag, 11 mars, hevur Svenning Reinert í Norðradali arbeitt hjá Færøernes Kommando í 40 ár. Svenning er fyrsti persónur, sum hevur arbeitt hjá Færøernes Kommando í so langa tið. Hann arbeiddi uppá Oyggjarvegin í 1959/60, síðan arbeiddi hann hjá skógfútanum í eitt styttri tíðarskeið. Í 1961/62 arbeiddi hann hjá SEVvið el-linjuni millum Vestamanna og Havnina. Tann 11. mars 1963 bleiv Svenning settur í starv hjá Flyvestationen Thorshavn, seinni Færøernes Kommando. Høvuðsuppgávan hjá honum hevur øll árini verið at halda vegin niðan á Sornfelli viðlíka og ymiskt annað fyrifallandi arbeiði. Síðan 1976 hevur hann verið Posthúsleiðari í Norðradali. Svenning dámar væl at fara á flot, eisini hevur hann ross, gæs og seyð. Móttøka verður í dag, 11. mars, frá kl.11.00-14.00 hjá Færøernes Kommando í Mjørkadali.

**mg**

## Teddy Michelsen 75 ár



9. mars bleiv Teddy Michelsen í Tvøroyri 75 ár. Teddy er føddur og uppvaksin í Valinum á Tvøroyri. Hann fór til skips sum 17 ára gamal og sigldi undir krígnum. Sum 20 ára gamal fór hann á Føroya Sjómansskúla, og hann sigldi í tilsamans 25 ár. Miðskeiðis í 60-unum fekk hann arbeiði hjá Landsverkfrøðinginum í Øravík sum maskinførari. Hetta arbeiði fevndi yvir alla Suðuroynna, og hevði hann ábyrgd av kavaruddingini til Hvalbiar og Sandvíkar. Sum limur í fakfelagnum Fylking, var hann formaður í eitt tíðarskeið. Eisini var hann nøkur ár í nevndna í Føroya Arbeiðarafelag. Teddy giftist í 1956 við Odu, fødd Bech, úr Trongisvági. Tey eiga fýra døtur, tríggjar búgva í Danmark og ein býr í Havn.

**mg**



## Asbjørn Heinesen 60 ár

Í dag, 11. mars, fyllir Asbjørn Heinesen í Havn 60 ár. Asbjørn er ættaður úr Klaksvík, sonur Stinu í Ánunum og Martin Heinesen, kallaður Martin hjá Kornelius og seinasta barn, sum varð føtt á Skarði.

Asbjørn tók realprógv í Klaksvík í 1960 og fór so til skips við Esther, sum pápin førdi. Eitt hálvt ár seinni kom Pison hjá Seglhúsmonnunum til Klaksvíkar sum eitt av teimum mongu nýbygdu stállínuskipunum. Martin fekk Pison at føra, og Asbjørn fór við.

Eitt ár seinni fór hann sum deksdrongur við farmaskipinum Karini K hjá Kjølbro. Teir sigldu nógvar túrar niður í Miðalhavið við fiski og høvdu salt heimaftur við. Eisini vóru teir á hvørjum ári fleiri túrar í Grønlandi við og eftir útróðrarmonnum og bátum. Asbjørn var við Karini K í hálvtfjórða ár og var í næstan hvørjum landi í Evropa, sum siglast kundi til.

Karin K varð seld til Týsklands í 1965, og Asbjørn fór við Tjaldrinum. Hann var við tí, til tað varð selt til Chile í 1967.

Hann fór nú á Sjómansskúla í Havn, tók stýrimansprógv í 1969 og skipsføraraprógv í 1970. Síðani fór hann út at sigla sum yvirmaður við skipum hjá A.P. Møller. Hann legðist uppi í 1978 og tók við starvi sum havnarumsjónarmaður og loðsur í Havn, og tað starvið røkir hann enn.

Í 1967 giftist Asbjørn við Gertrud Berg úr Havn. Tey eiga fýra børn: Jógvan Martin 1967, Jákup Hans 1969, Elin 1971 og Røgvi 1973.

Asbjørn eigur ein beiggja, sum eitur Harry. Hann er giftur við Gunnleyg Rasmussen úr Klaksvík. Eisini tey búgva í Havn.

## Elsuba Iversen 60 ár



Sunnudagin 9. mars fylti Elsuba Iversen í Kvívík 60 ár. Elsuba er ættað úr Havn, dóttir Johannes Samuelsen (Hannis í Horni) og Petru, fødd Gregersen, úr Syðrugøtu.

Petra og Hannis fingu fýra børn: Heðin, Sigrun, Elsuba og Hjørdis.

Elsuba giftist til Kvívíkar við Tummas Iversen, sum var sonur Hansinu og Hanus í Kollinum. Elsuba og Tummas fingu børnini Hans, sum býr í Noregi, Petru, sum býr í Kvívík, og Høgna, sum lesur uttanlands.

Tummas varð ikki gamal maður. Hann doyði longu á jólum í 1976, og Elsuba varð einkja bert 33 ára gomul.

Í 1985 fór Elsuba at arbeiða í Norðurlandahúsinum, men við síðuna av hevði hon handilin, sum Hanus í Kollinum hevði havt í Kvívík. Hon hevði handilin, til dóttirin Petra tók yvir. Elsuba eigur trý ommubørn.

Mong munna annars kenna Elsubu frá hennara stóra áhuga fyri sangi, tí hon hevur sungið í kóri í mong Harrans ár.

Nú Elsuba rundaði tey seksti arbeiðir hon framvegis í Norðurlandahúsinum og koyrir hvønn dag til Havnar og norður aftur til Kvívíkar, tá arbeiðsdagur er lokin.

## Navnið á degnum í dag

11. mars: Thala. Ókend ung genta, sum tíðliga í fornkirkjuni varð tikin av døgum fyri trúgv sína.

## Ingi Gunnarsson til PM



1. januar varð Ingi Gunnarsson settur í starv sum sølumaður hjá Poul Michelsen heilsølu, við ábyrgd fyri sølu í Suðuroynni og Sandoynni v.m. Ingi er 47 ára gamal og havnarmaður. Hann tók útbúgving sum fiskivinnuatstøðingur í Íslandi frá 1976-79 og HH prógv á Føroya Handilsskúla í 1982. Hann hevur arbeitt við sølu í mong ár. Seinastu 10 árini sum sølumaður hjá Landshandlinum í Havn.

**mg**

## 80 ár

Í dag, 11. mars verður Thala Rókstein, Fuglafjørður 80 ár. Dagurin verður hildin hjá Kaj Eli Blábjørg, Mørkin 22.

## Silvurbrúdleyp

Í dag, 11. mars hava hjúnini Ann og Johan Hansen silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin saman við familjuni í Tinghøjvej 25, 7330 Brande.